VALGREINAR

# Er munur á føroyskum og donskum discusprolapsi?

**Jenis av Rana**
*Løgtingsmaður fyri Miðflokkin*



At hava discusprolaps er tiltikið pínufult. Talan er um at bleyti vevnaðurin, ið liggur ímillum ryggjageislarnar, umgyrdur av einum harðari ringi, smoyggir sær út millum geislarnar og trýstir á nervar. Sokallað konservativ viðgerð kann eydnast, men mangan endar tað við skurði, einfalt tí at pínan er so hervilig.

**Discus hin sami, bíðitíðin fleirfald.**
Danskir sjúklingar bíða í seks vikur frá tí avgerðin um skurð verður tikin, til skorið verður.

Hvussu við føroyingum?

Jú, teir bíða í 23 viku!!! Men teir eru ikki einsamallir, tí hyggja vit at teimum, ið ganga við pínu vegna slit í mjadnum, er uppaftur verri.

Frá tí at danir taka avgerð um at skifta mjadnar/ knø- alt vegna pínu- ganga 10 vikur til skurðviðgerðin verður framd.

Føroyskir sjúklingar bíða í 52 vikur.

**Fyrispurningur frá Miðflokkinum**
Tølini, eg endurgevi omanfyri, eru partur av tølum, sum eru at finna í svari uppá fyrispurning frá Miðflokkinum til landsstýrismannin á almanna- og heilsumálum í mars í ár.

Fyriuttan at siga frá syrgiligu støðuni, sjúklingarnir eru í, so ber hetta okkum boð um ein ábyrgdarleysan politikk á heilsuøkinum seinastu 4 árini.

Aftur og aftur verja landsstýrisflokkarnir seg við, at teir ikki hava megna at fáa landið aftur á føtur eftir kreppuárini. Men sannroyndin er jú, at:

1) fiskaprísirnir hava verið methøgir,
2) fiskiskapurin hevur verið í hæddini,
3) rentustøðið hevur verið lagaligt,
4) inntøkurnar til landskassan hava verið ovurhonds stórar.

...og vit kundu hildið á.

Men umsorganin fyri landsins íbúgvum ( ella er talan um manglandi førleika) hevur eftir øllum at døma ikki ligið teimum fremst á hjarta.

**Set eina kanning í verk av???**
Tá eg undir viðgerðini av løgmansrøðuni í august 2001 royndi at greiða frá viðurskiftunum hjá vanliga føroyinginum, m.a. metstóru bíðilistunum, bað samgongutingmaður løgting og landsstýri seta eina kanning í verk av- og halt tær fast- ikki støðuni hjá vanliga føroyinginum, men av tí, sum Jenis av Rana førdi fram. Løgtingsmaðurin segði seg ikki vilja finna seg í at hoyra slíkt verða borið fram, noktaði fyri, at hetta var satt.

Óneyðugt at siga tær, at eg bað hann og teir fáa hesa kanning gjørda skjótast gjørligt, tí eg visti, hvat hon vildi víst.

Men nei, kanningin var ikki gjørd, tí kunnu vit jú liva við. Verri er, at ábøtur heldur ikki vórðu gjørdar.

**Lyfti Miðfloksins um familju- og trivnaðarmálaráðharra**
Nú skilir tú kanska betur lyfti Miðfloksins um, at koma vit út í landsstýrið eftir valið, so fara vit at seta á stovn familju- og trivnaðarráð við egnum landsstýrismanni. Uppgáva hansara verður at tryggja sær at vanligi føroyingurin á allan hátt hevur góð kor at liva undir.

# Stórt politiskt vald!

**Høgni Mikkelsen**
*valevni fyri Sambandsflokkin í Suðurstreym*



Loysingin fer at geva Høgna Hoydal stórt vald, men fjøldin verður við skerdan lut.

Flest allir føroyingar viðurkenna nú, at loysingin fer at hava við sær, at vit missa so nógv rættindir og valmøguleikar, at tað persónliga frælsið verður munandi avmarkað og flutt 55 ár aftur í tíðina.

Loysingin kemur ongantíð, at geva okkum líka nógv frælsi og líka nógv sjálvstýri, sum eitt gott og virðiligt samstarv í ríkisfelagsskapinum gevur.

Landsstýrið hevur skrivað Hvítubók og Svørtubók, men enn vantar Grønabók, sum lýsir fyrimunir og vansar í ríkisfelagsskapinum. Tá hon einaferð verður skrivað, vil eisini Høgni Hoydal velja Sambandsflokkin.

# Akutti tørvurin á røktarstarvsfólki má loysast

**– annars fara tey gomlu at ansa sær sjálvum á røktarheimunum**

**Joan Ziskason**
*valevnið hjá Javnaðarflokkinum í Suðurstreymoy*



Í hesum valstríðnum eru allir flokkar samdur um, at fleiri røktarheimspláss skulu byggjast ella útvegast. Undirritaða tekur fult undir við tí. Men ein annar, kanska líka so stórur trupulleiki, er við at stinga seg upp, og tað er tørvurin á røktarstarvsfólki inni á røktarheimunum. Her má ein loysn finnast, tí annars mugu tey gomlu veiku ansa sær sjálvum.

Loysnin á hesum trupulleika er:

• Sjúkrasystraskúlin skal víðkast, so pláss verða fyri fleiri lesandi, so vit fáa fleiri sjúkrasystrar

Heilsurøktarskúlin á Tvøroyri skal útbúgva fleiri næmingar.

# Friðingin í Vágahavinum

**Jóanis Nielsen**
*valevni Fólkafloksins í Vágum*



Las í grein hjá sambandshøvdinganum í Norðoyggjum at "Sambandsflokkurin er einasta trygd fyri, at friðingin vestanfyri ikki verður endurtikin".

Sagt verður at: "Um sambandsflokkurin umsat fiskivinnumál hevði tað ikki komið uppá tal, at friðað økið vestanfyri." víðari verður sagt: "At avleiðingin av hesum var, at allur línuflotin mátti royna norðanfyri"

Einki verður nevnt ella hugsað um, hvørja ávirkan hetta hevur havt á útróðraflotan vestanfyri.

**Vágamenn sera tolnir**
Vágamenn sum eru sera tolnir, hava í eini 20-25 ár liva undir hesum korum. Línubátar úr Norðoyggjum, Eysturoy og úr Havn hava avtaglað Vágahavið við línu, ja, klos í klettin og inn í vágin (Miðvág/Sandavág). Eingilsku trolararnir togaðu eisini fyri 100 árum síðan eftir øllum gýtingarøkinum, líka inn á Sandavág, har teir tóku posan inn.

Nei, veruleikin er tann, at útróðrarmenn vestanfyri hava verið alt ov tolnir, tað vísir seg nú, at aftur ber til at fiska við snellu, lønandi, í Vágahavinum - útróðrarmennirnir eru sera fegnir um hesa friðing, teir halda, at friðingin skuldi verið longur inn.

Tað skal eingin ivi verða, at um eg fái møguleikan eftir komandi val, so skal arbeiðast av fullum huga fyri at fáa friðingina at fevna um alt gýtingarøkið.

# Miðflokkurin vil arbeiða fyri einum øðrvísi familjupolitikki

**Jónfinn Olsen**
*Form. í UfM & valevni Miðfloksins í Suðurstreymoy*



Miðflokkurin vil arbeiða fyri at familjuni verða tryggjaðar tær bestu umstøður, soleiðis at trygg heim og góðir uppalingarmøguleikar eru hjá okkara børnum. Her hugsi eg um, at sum samfelag okkara er uppbygt, er neyðugt við ansingarplássum og at hesin tørvur verður dekkaður vilja vit virka fyri, men vit í MIÐFLOKKINUM vilja samstundis skunda okkum at gera púra greitt, at foreldrum eigur at verða givin vælmøguleikin at ansa børnum heima í egnum heimi. Tú spyr kanska, hvussu kann hetta gerast, jú við millum annað at gjaldið fyri barni fylgir barninum og ikki ansingarplássinum.

So verður tann mamman, sum vil av sínum egna fríða vilja verða heima hjá sínum barni, ikki noydd út at arbeiða, men kann verða heima hjá sínum barni í egnum heimi, uttan at tað fær stórvegis fíggjarligar fylgjur.

MIÐFLOKKURIN YNSKIR, AT TÚ SKALT TRÍVAST Í FØROYUM, TÍ HER SKAL VERÐA GOTT AT BÚLEIKAST. HEVUR TÚ SOMU HUGSAN, SO VELUR TÚ MIÐFLOKKIN VALDAGIN 30 APRÍL. GOTT VAL.

MIÐFLOKKURIN TÍ RØDD Á LØGTINGI.



VALGREINAR

# Vit vilja menna vælferðarsamfelagið

**Kaj Boetius**
*valevni javnaðarfloksins í Norðoya valdømi*



Javnaðarflokkurin vil útvega í minsta lagi 160 ellis- og røktarheimspláss tey komandi fýra árini. Vit vilja at heimarøktin skal útbyggjast við eini døgnrøktarskipan, at pensiónin hjá støkum skal uppá 10.000 kr. og hjá hjúnum uppá 16.000 kr., at fyribyrgjandi og viðgerandi heilsuverkið skal styrkjast og vit vilja somuleiðis skapa virðiligar umstøður fyri fólk við skerdum førleika.

Børn og ung eru framtíðin. Tí vilja vit virka fyri einum betri skúla. Vit vilja hava eina nýggja skipan sum kann verja áhugamálini hjá brúkarunum. Somuleiðis vilja vit hava ein nýggjan arbeiðsmarknaðarpolitikk, vit vilja virka fyri nýggjari leigulóg og veita stuðul til bygging av leiguíbúðum. Skattatrýstið á láginntøkurnar skal lækkast og lógin um meirvirðisgjald skal endurskoðast. Í hesum sambandi skal meirvirðisgjaldið setast aftur til tað upprunaliga - 23%.

Vit ásanna at fiskivinnan er og verður álitið, men vit vilja virka fyri at skapa karmar um eina fjølltáttaða vinnu á høgum førleikastigi og við góðum sosialum skipanum. Vit ásanna, at vælferðarsamfelagið er treytað av einum góðum, sunnum og ábyrgdarfullum búskaparpolitikki og vilja virka fyri, at eingin skal gera sær dælt av fólksins ognum. Vit vilja eisini hava samfelagsliga tilbúgving at møta oljuvinnuni og teim avbjóðingum hendan vinna fer at hava við sær.

Mentunarpolitikkur javnaðarfloksins er framtíðarpolitikkur. Javnaðarpolitikkur er eisini umhvørvispolitikkur. Vit vilja at miðfyrisitingin skal umskipast og at tænastan til borgaran skal betrast. Sjálvstýrislógin skal greiða ríkisrættarligu viðurskiftini millum Føroyar og Danmark.

Farið tí mannsterk á val og seti ein sterkan javnaðarflokk inn á Føroya Løgting á valinum týsdagin 30. apríl. X við lista C ella eitt av valevunum á lista javnaðarfloksins. Gott val.

# Steðga førda loysingarpolitikkinum, áðrenn hann steðgar tær

**Kristian Magnussen**
*løgtingsmaður og valevni fyri Javnaðarflokkin*



Dagliga uppliva vit, at samgongan framhaldandi roynir at grugga og halda føroyingar í óvissuni um, hvat ið henda skal framyvir viðvíkjandi ríkisrættarligu viðurskiftum okkara.

Fáfongda loysingarætlanin hjá sitandi samgongu setir vælferðina hjá okkum í vága. Teirra metodur ella strategiir at náa fullveldinum eru væl kendar millum felagsskapir, ið ikki arbeiða eftir demokratiskum grundsjónarmiðum, og sum heldur ikki hava fólkið aftan fyri seg. Teir eru so fullvísir um sín egna førleika og politisku ætlan, at tað ikki er neyðugt at fólkið verður spurt, hvat teir annars lovaðu.

Tað sum samgongan hevur lagt fyri dagin í samráðingunum um ríkisrættarligu viðurskiftini, má vera eindømi í diplomati og samráðingarkynstri. Ein og hvør, ið ætlar sær at fáa nakrar sømdir frá mótpartinum, kallar ikki mótpartin fyri imperialistar, koloniharrar og harrafólk. Tá er úrslitið givið frammanundan.

Tá alt var dóttið á gólv, fór samgongan til Danmarkar fyri 4. ferð, við kravinum um at danir skuldu viðurkenna okkum sum sjálvstøðug tjóð. Tað kundu danir av góðum grundum ikki gera ímóti føroyska fólkinum.

Veljarin eigur ikki at gloyma at teirra fullveldi partvís skal fíggjast við at fólkapensiónin og samhaldsfasti skulu avtakast og skipanir har hin einstakið skal tryggja sín egna aldurdóm og sæta sær sjálvum skulu fremjast.

Javnaðarflokkurin hevur sum mál, at bæði fjøldin av føroyingum og einstaklingar, hava góð livikor og eiga rættin til eitt virki og mennandi lív. Í dag er Javnaðarflokkurin tann einasti flokkurin, ið hevur sum hugsjón, at varðveita og menna eina samfelagsskipan, ið byggir á prinsippini um líkheit, tryggleika og solidaritet.

Javnaðarflokkurin fer undir ongum umstøðum at seta vælferðina, rættindini og møguleikarnar í ríkisfelagskapinum upp á spæl. Allur okkara politikkur snýr seg um at betra møguleikarnar hjá tí einstaka og harvið hjá okkum øllum.

# Torbjørn, vælsignaður lat føroyingar ráða í Føroyum og ikki danska Fólkatingið

**Thomas Arabo**
*valevni Javnaðarfloksins í Suðurstreymoy*



Teir tora ikki at spyrja Føroya fólk, men danskarir skulu samtykkja nakað niður yvir nakkan á okkum Føroyingum, tí Tjóðveldisflokkurin og Torbjørn formáa sær ikki at savna føroyingar um síni víðgongdu sjónarmið.

**Skulu ikki føroyingar ráða í Føroyum?**
Tað má sigast at verða skammiligt at biðja eitt útlendskt parlament hjálpa sær við nøkrum, ið Torbjørn og Tjóðveldisflokkurin ikki tora at spyrja føroyingar um. Tað má vælsaktans merkja loysing, tá vit verða róptir natión í ST. Er tað Fólkatingið, sum skal fremja loysingina í Føroyum? Skulu Føroyingar ikki ráða í Føroyum?

**Skal ein minniluti fremja loysingina við danskari hjálp?**
Vit kunnu loysa í morgin, um tað skal verða. Tobbi og Tjóðveldisflokkurin mugu bara yvirbevísa føroyingin um tað rætta í tí. Hetta seinasta nummarið hjálpir neyvan nakað, tí føroyingar fara ikki at finna seg í, at ein minniluti við danskari hjálp roynir at fremja loysingina. Kann tað gerast meira mannminkandi fyri føroyingar?

**Spyr føroyingin!**
Tað er ein sannroynd, at samgongan tordi ikki eina fólkaatkvøðu. Tað er undanførsla tá størsti samgonguflokkur sigur, at hinir vildu ikki. Vit eru ein tjóð, men ikki en statur í dag. Tað kunnu vit gerast í morgin, men vælsignaðir spyrjið føroyingin fyrst, áðrenn tit so undirbrotliga biðja eitt útlendskt parlament kroysta nakað niður um oyrini á okkum. Mín áheitan til Torbjørn Jacobsen og Tjóðveldisflokkin skal verða: Latið føroyingar ráða í Føroyum og ikki danska Fólkatingið. Hetta trúgva vit uppá í Javnaðarflokkinum. Setið X við lista C tann 30 apríl

# Tyngd og realitetir á Lista B tann 30. apríl

**Kaj Leo Johannesen**
*Valevni Sambandsflokkurin í Suðurstreymi*



Vit kunnu tosað leingi um blokkin úr Danmark, men veruleikin er, at blokkstuðulin ongantíð, hevur verði hægri.

Vit kunnu tosað leingi um, at lækkað blokkin við 360 milliónum, niðurskurðurin verður í næsta valskeiði.

Vit kunnu tosað leingi um ábyrgdina ella æruna av, at okkara fiskaprísir ongantíð hava verði hægri enn seinastu fýra árini.

Vit kunnu tosað leingi, um ábyrgdina ella æruna av, at alheims rentustøði, hevur verði metlágt seinastu árini.

Ein av minkinginum í hesum valskeiði er keypiorkan, hon er minkað við uml 11 %, Samgongan segði seg vilja minka skattatrýstið, ikki keypiorkuna.

Vit mugu torað at útinna Fair Play, her hugsið eg um fólkaatkvøðuna, sum Samgongan ella rættari sagt Fólkaflokkurin, ikki tordi at útskrivað, vegna ov lítla undirtøku frá fólkinum til førda politikkin.

Vit mugu ikki í framtíðini góðtaka av Landsstýrismanni at siga ósatt fyri Føroya fólki, fyri aftaná fáa eitt millumting millum Reytt og Gult kort, hettar er í veruleikanum eitt vælsignilsi at halda áfram, við tí atgerð sum gjørdi, at kort verður givið, líkamikið hvønn flokk talan er um, eftirsum hettar er tað ringasta, fyri álitið á eina politiska skipan.

Hvør krógvar sannleikan, er tað tann heimskendi statsmaðurin Thorvald Stoltenberg ella er tað Norðuratlantsbólkurin.

Nú fara vit at byggja land sjálvir, sigur Tjóðveldisflokkurin, so má spyrjast, um ikki okkara forfedrar eisini bygdu land, okkara vælferð livir í hitanum av hondum, sum sleptu, á sjógvi og landi, tær vóru allar við til at byggja tjóðina, bæði áðrenn og aftaná vit vóru fødd.

Nú verður spottandi sagt í nýggjum faldara at "afturhaldskreftirnar taka einki stig sjálvir, tær hava latið onnur gjørt tað tunga arbeiði, og spottað tey afturfyri, men notið úrslitini við góðari samvitsku, og vælgagnist teimum, hetta haldi eg eru hørð, rámandi og ljót orð, um meginpartin av føroyska fólkinum.

Lat mín boðskap til allar flokkar verða saman, at finna eina loysn á Ríkisrættarligu støðuni, vit hava øll ábyrgdina, ikki bara Samgonga ella Andstøða, tí hvussu tað so víkjir og vendir, við sambandi ella fullveldi, so skulu vit øll, eisini aftaná valið, livað í sátt og semju, og ikki gloyma hitan av forfedranna hondum, sum verðuliga bygdu tjóðina sum vit øll vilja bert tað allarbesta.